# Úlvasangurin

Lag: Clementine

Enn vit eru nakað smáir,
men vit skulu roynast væl
og í brøgdum gerast knáir,
sum hitt unga liðið skal.

Smáir úlvaungar vanda
sær um tíð og stund og lag!
Knáir úlvaungar standa,
verja borg og búð og stað!

Úlvin gamla ein má lýða,
hann í ráðum góður er,
hann kann allar snildir týða,
veit hvat okkum hentast er.

Ungir úlvar eru kvikir,
um tað kallað er á teir,
ganga allir líka kykir,
kallast ein, so koma tveir.

Snimma skulu snildir lærast,
snimma lívið livast skal,
sjónarringurin skal skærast,
sýnast tí, ið nemur væl.

Báðumegin garðaliðið,
eins í haga og í bø,
hav í huga høvuðsmiðið:
Lýða lóg frá Á til Ø.

Yvir teigar, yvir heiðar,
tú ein dugnaúlvur ver!
Ver til reiðar, ver til reiðar,
hjálpsemi í skildri ber.

M.S Viðstein

# SKÓTASANGURIN

Lag: ja,vi er danske spejdere

Føroyskir skótar eru vit,
og hvat tað týðir, vit vita.
Og lyftið góvu ein fagran dag,
í enni várt er tað ritað:
Við Gud´ og landi og fosturstrond,
har lagnan okkum býður,
til reiðar allar tíðir
við hjarta, hug og hond.

Til reiðar! Hoyr tann ódnarstorm,
ið yvir heimin ríður!
Spenn bogan væl og hvess tín ørv,
nú eru broytingartíðir.
Vit knýta okkara brøðraband
í vinalag og gaman,
so sjóða vit okkum saman
- ein garður um Føroya land

M.S Viðstein týddi